## UTTAN ÚR HEIMI

## Bjóða fólki deyðshjálp

Sveisiska sjúkrahúsið Dignitas bjóðar sær til at hjálpa fólki at doyggja, og fólk í fleiri evropeiskum londum hava fingið tilboðið frá sjúkrahúsinum, skrivar svenska blaðið Aftonbladet.

Dignitas hevur eina skipan, har fólk kunnu tekna seg sum limir. Tey rinda so eitt árligt limagjald umframt eina byrjanarupphædd. Sambært Aftonbladet hava fleiri sjúkir sviar teknað seg sum limir hjá sveisiska sjúkrahúsinum, men enn er eingin svii farin hagar at doyggja, skrivar blaðið.

Sveisiskir læknar hava loyvi at hjálpa fólki at doyggja. Tað sama er galdandi í Niðurlondum, Belgia og amerikanska statinum Oregon, men treytirnar, sum teir sveisisku læknarnir arbeiða undir, eru munandi lagaligari enn í hinum londunum. Harafturat leggja teir sveisisku myndugleikarnir seg ikki útí, at sjúkrahúsini bjóða útlendingum deyðshjálp.

## Blair verjir umhvørvið

Bretski forsaætisráðharrin, Tony Blair, vil hava altjóða samfelagið at leggja størri dent á at avmarka avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum.

Í einari røðu fyrrakvøldið segði hann, at hann ætlar sær at seta málið á dagsskránna fyri næsta fundin hjá teimum stóru ídnaðarlondunum. Blair legði dent á, at tað er ikki nóg mikið, at bara tey stóru ídnaðarlondini royna at avmarka avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum, men at allur heimurin má taka neyðug stig. Og vit hava skund, segði Blair, sum segði seg vænta, at stórar veðurlagsbroytingar fara at henda í hansara tíð. Hann helt, at okkum tørvar eina grøna ídnaðarkollvelting, sum kann útvega okkum nýggja tøkni, ið kann avmarka avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum.

Eygleiðarar í London siga, at tann stóra uppgávan hjá Blair verður at fáa USA at taka undir við tiltøkum, sum skulu avmarka broytingarnar. Bretska stjórnin hevur sagt, at hon fer at leggja størri trýst á George W. Bush, forseta.

## Stúra fyri gosi á Hawaii

Amerikanskir jarðfrøðingar siga seg stúra fyri, at gosfjallið Mauna Loa á Hawaii-oyggjunum fer at goysa um stutta tíð.

Mauna Loa er heimsins størsta gosfjall. Tað eru 20 ár, síðani gosfjallið goysti seinasta, men jarðfrøðingar, sum halda eygað við fjallinum, siga, at í seinastuni er virksemið í fjallinum økt nógv, og tí vænta teir eitt gos um stutta tíð. Ein av jarðfrøðingunum, Paul Okubo, sigur við sjónvarpið CNN, at gosið nærkast fyri hvønn dag, sum fer. Hann sigur, at teir báðar seinastu mánaðarnar hava umleið 350 smáir jarðskjálvtar verið við Mauna Loa, og at hetta er nógv meiri enn vanligt.

Undir gosinum í 1984 hótti Mauna Loa við at leggja býin Hilo undir, og tí hava myndugleikarnir gjørt ein verjugarð, sum skal verja býin.

## Gongur illa hjá VW

Tað veksandi arbeiðsloysið í Týsklandi hevur gjørt, at týskarar keypa ikki so nógvar bilar longur, og tað er komið bilverksmiðjuni Volkswagen/Chrysler illa við, skrivar tíðarritið Bloomberg.

Í august minkaði bilasølan hjá Volkswagen 8,3 prosent, samstundis sum Chrysler seldi 13 prosent færri bilar enn í juli. Fyritøkan sigur, at arbeiðsloysið er orsøkin, og at týskarar, sum hava arbeiði, tora heldur ikki at keypa sær nýggjan bil, tí teir vita ikki, um teir varðveita arbeiðið.

Tey ótryggu viðurskiftini á týska arbeiðsmarknaðinum raka ikki bara bilídnaðin. Sambært Bloomberg eru teir týsku íleggjararnir so varnir sum sjáldan fyrr. Arbeiðsloysistølini eru heldur ikki serliga eggjandi. Í august mistu 24.000 týskarar arbeiðið, so nú eru 4,4 milliónir arbeiðsleys.

# Evnafrøðilig vápn ímóti flóttafólki



*Børn í einari flóttafólkalegu í Darfur. Sambært Die Welt hava myndugleikarnir nýtt evnafrøðilig vápn í landspartinum*

**Týska blaðið Die Welt vil vera við, at evnafrøðilig vápn úr Sýrialandi vórðu roynd í einari hernaðarvenjing í Sudan herfyri**

VÁPNAROYND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Die Welt sigur seg hava fingið tíðindini frá keldum, sum ikki vilja verða nevndar. Sambært teimum høvdu teir sýrisku myndugleikarnir skotið upp at royna tey evnafrøðiligu vápnini ímóti sudansku uppreistrarrørsluni SPLA, men av tí at rørslan júst hevði játtað at tingast við sudansku stjórnina, bleiv avgjørt at royna vápnini ímóti sivilfólki í landspartinum Darfur ístaðin fyri.

Die Welt sigur seg hava fingið at vita frá keldunum, at fleiri flóttafólk, sum eru flýdd úr Darfur, hava sár, sum tey fingu av teimum evnafrøðiligu vápnunum. Tann 2. august visti ein arabisk tíðindastova at siga frá, at fleiri lík úr Darfur vóru komin á Al Fashr-sjúkrahúsið í sudanska høvuðsstaðnum Khartoum. Øll líkini vóru fryst, og arabiska tíðindastovan vildi vera við, at hetta vóru fólk, sum vóru deyð av teimum sýrisku vápnunum.

Sambært keldunum hjá Die Welt vóru fleiri sýriskir heryvirmenn í Khartoum í vár og tosaðu við sudansku herleiðsluna um samstarv.

# Ónýttar kirkjur skulu brótast niður

**Fleiri av teimum norsku kirkjunum verða so lítið brúktar, at tað verður hildið rættast at selja tær ella at bróta tær niður**

NOREG
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fyrstu ferð hevur norska kirkjuráðið gloppað dyrnar fyri møguleikanum atselja fleiri av landsins kirkjum ella at bróta tær niður. Kirkjuráðið er ovasti myndugleiki í norsku kirkjuni burtursæð frá tí árliga kirkjufundinum.

Ráðið samtykti týsdagin at taka upp samráðingar við teir lokalu kirkjumyndugleikarnar kring landið fyri at vita, hvussu nógvum kirkjum tørvur er á, og um tað ikki er rættast at taka nakrar av kirkjunum niður.

Í kirkjumálaráðnum í Oslo taka tey undir við sjónarmiðinum hjá kirkjuráðnum, skrivar Aftenposten. Har siga tey, at tað eru ikki fíggjarlig viðurskifti, sum gera tað rætt at taka nakrar kirkjur niður, men at fleiri kirkjur verða so lítið brúktar, at tað er heilt einfalt ikki tørvur á teimum.

Ole Herman Fisknes í kirkjumálaráðnum sigur við blaðið, at fyrr var ofta neyðugt at fara í bát fyri at sleppa í kirkju, og tí vórðu kirkjurnar ofta bygdar eftir viðurskiftunum, sum tá vóru. Men soleiðis er ikki longur.

Í Noregi eru 1620 kirkjur. Av teimum eru 120 friðaðar, og 760 aðrar eru mettar verdar at friða.

Norski landsfornfrøðingurin, Nils Marstein, heldur lítið um ætlanina at bróta kirkjur niður. Hann ásannar tó, at tað er umráðandi, at kirkjurnar verða brúktar til tað, sum tær eru ætlaðar til.

Í Svøríki bleiv kirkjan skild frá statinum fyri sjey árum síðani. Undan skilnaðinum bleiv avgjørt, at allar miðaldarkirkjurnar eru almenn ogn, og at staturin hevur skyldu at halda tær við líka. Men eina slíka loysn vil norska kirkjan ikki hava.



# Tyrluflúgving til ferðafólk burturav



*Maria Samson Lamhauge á marknaðardeildini hjá Atlantsflogi hevur staðið fyri nýggju Mykinesætlanini*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Komandi summar fer onnur tyrlan hjá Atlantsflogi burturav at flúgva við ferðafólki til og úr Mykinesi hvønn leygardag frá jóansøku til seinast í august**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Reykjavík:** Næsta summar fer at bera til hjá ferðafólki at sleppa til Mykinesar og heim aftur sama dag við tyrlu. Atlantsflog fer at flúgva dupultan túr ella eftir tørvi út í Mykines við feðrafólki hvønn leygardag frá jóansøku til 20. august.

– Men verður tørvur á tí, ber væl til at leingja hesa tíðina, sigur Kent Christensen, sølustjóri hjá Atlantsflogi.

Felagið hevur tvær tyrlur, og onnur er vanliga tøk allan leygardafin, tá ikki so nógv vinnulig leiguflúgving er, sigur hann. Og fyri at fáa brúkt hesa tíðina sum best, verður nú farið undir hesa royndina, sum í fyrst aumfari fer at umfata Mykines.




*Manningin má fáa neyðugu hvíldina, og tí er kvøldtúrurin hjá Teistanum fyribils avlýstur*

# Fyribils siglir Teistin ikki kvøldtúrin

**Teistin fer kortini ikki at sigla ætlaða kvøldtúrin**

SAMFERÐSLA
*tíðindaskriv*

Strandferðslan og Skipaeftirlitið hava avrátt, at Teistin ikki skal sigla kvøldtúrin fyribils – meðan arbeitt verður við at endurskoða vaktarætlanina fyri Teistan

Tann 11. august kom í gildi nýggja vaktarætlan umborð á Teistanum – hetta var, tá farið varð at sigla kvøldtúrin.

Av tí at umstøður ikki eru at hvíla umborð hjá manningini meðan skipið er í sigling, hevur spurningur regluliga verið frammi, um nú vaktarætlanin er í tráð við tær formligu ásetingarnar um hvíld.

– Strandferðslan og Skipaeftirlitið hava í seinastuni arbeitt við málinum, og á fundi í dag eru partarnir samdir um at endurskoða vaktarætlanina við atliti til at fáa eina aðra vaktarætlan, har ikki er neyðugt hjá manningina at hvíla umborð, meðan skipið er í sigling, og í tí tí sambandi verður kvøldtúrurin ikki sigldir fyribils, sigur Regin Vágadal, rakstrarleiðari á Strand-fara-skipum Landsins.

Sagt verður, at Strandferðslan arbeiðir við einar nýggjari vaktarætlan, og eftir ætlan verður hon send út til hoyringar í vikuni, og sigur Strandferðslan seg arbeiða fyri, at túrurin verður uppafturtikin skjótast til ber.




FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur. Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur. Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452